

Auto Trade, Tórshavn:

*Finn Andreasen og Jens Paul Dahl við Lada bilum á Statoilstøðini í Øravíkarlíð, sum nú umboðar Lada í Suðuroy*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

# Lada nú eisini seldir í Suðuroy

**Nú eitt ár eftir at Auto Trade í Havn fóru at selja russisku Lada bilarnar, hava teir fingið sær søluumboð í Suðuroy. Tað er Statoilstøðin í Øravíkarlíð, v. Finn Andreasen, sum umboðar teir har**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sølan av Lada bilunum hevur gingið væl, bilarnir eru bíligir og fólk hava tikið sera væl ímóti teimum, sigur Jens Pauli Dahl, frá Auto Trade, sum umboðar Lada í Føroyum. Teir verða seldir sum sedan, hatchback og stationcar. Í løtuni hava teir hatchback sum kosta kr. 89.800 og stationcar fyri kr. 99.800.

Jens Pauli sigur, at fólk halda ofta lítið um Lada bilarnar, tí teir eru so bíligir, men sannheitin er, at tey fáa ein góðan rúmligan bil í somu støðd sum t.d. Toyota Corolla ella VW Golf við 1,5 litur 16V motori við 92 hk. Haraftrat er 2 ára garanti er upp á bilarnar, og teir skulu bert til eftirlit eina ferð um árið ella fyri hvørjar 15.000 km.

Lada samastarva við General Motors, og tekniskt virka teir sera væl, sigur Jens Pauli.

Finn Andreasen hevur havt bilverkstað í Øravíkarlíð í 33 ár og servicestøð í 17 ár. Hann kemur at hava eykalutagoymslu og service av Lada bilunum í Suðuroy um hendur. Fleiri Lada bilar eru seldir í Suðuroy, og stóri fyrimunurin hjá kundunum er, at teir nú sleppa frá at fara av oynni, tá bilarnir skulu til eftirlit o.a.






*Nýggjur Peugeot 407. Designið er smart og áleypandi við stórum Peugeot-logo framman og kølagittarinum niðan fyri forlyktirnar. 407 vakti ans í Bella Centrinum, og áhugin var stórur fyri bilinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Smartur og avbjóðandi Peugeot 407

**Sjáldan hevur verið bíðað við so stórum spenningi eftir einum nýggjum bilmodelli, sum nú áðrenn Peugeot koma á marknaðin við 407. Bilurin hevur smart og avbjóðandi design og er í einum klassa fyri seg**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Núverandi Peugeot 406 verður í næstum avloystur av einum heilt nýggjum 407, sum er ein nakað størri bilur við designi, trygd og koyrieginleikum í einum klassa fyri seg.

Peugeot 407 verður als ikki anonymur í gøtumyndini. Designið er smart og áleypandi við stórum Peugeot-logo og kølaragittaranum í kúfangaranum, niðan fyri forlyktirnar. Tað er italski bildesignarin Pininfarina, sum eisini teknar italsku Ferrari sportvognarnar, ið hevur designað Peugeot 407. Tað sæst aftur í avbera vøkru og smartu linjunum.

Tað er ikki bert útsjóndin, sum er nakað serligt, men eisini tann innbygda trygdin og koyrieginleikarnir, sum eru nakað heilt serligt. Róðurgreiðir og upphangini framman og aftan eru nýggj og sera framkomin við t.d. multilink bakakslum.

Talan verður um ein sera spennandi og framkomnan bil við nógvari nýhugsan, smartum designi, trygd og koyrieginleikum í serklassa.

Hann fæst útgávunum SR og ST, sum er tann betri útgjørdi.

Av trygdarútgerð hevur 407 t. d. antispinn, airbag framman, í síðunum, gardinairbag og airbag í rattstammuni, sum verjir beinini hjá bilføraranum. Hurðarnar læsast automatiskt undir koyring.

Fleiri bensinmotorar vera at velja ímillum: 1,8 litur við 116 hk, 2,0 litur við 136 hk, 2,2 litur (6-gir) við 158 hk, og 3,0 litur V6 við 211 hk. Tveir HDi dieselmotorar verða eisini á skránni: 1,6 litur við 110 hk og 2,0 litur (6-gir) við 136 hk, báðir hava teir innbygt FAP sótfiltur.

Peugeot 407 kemur eisini sum stationcar, sum kallast 407 SW. Bilurin stóð á Copenhagen Auto Show 2004 sum konceptbilur, og kemur á marknaðin seinni í ár.



*Peugeot 407 innan. Bilurin hevur airbag framman, í síðunum, gardinairbag og airbag í rattstammuni, sum verjir beinini hjá bilføraranum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Italski bildesignarin Pininfarina hevur teknað Peugeot 407, tað sæst aftur í avbera vøkru og smartu linjunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Peugeot 407 2,0 SR

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 4 syl. 136 hk |
| 0-100 km/t | 10,3 sek |
| Bensinnýtsla | 12,2 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 205/60-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 467,6 cm |
| Breidd | 181,1 cm |
| Hædd | 144,7 cm |
| Vekt | 1400 kg |
| Viðførisrúm | 407 litrar |
| Prísur | kr. 259.000,- |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v. Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.bilarge.fo |